# Mitt bottenliv: av en ensam axolotl

(Mítt botnlív: skrivað hevur ein einsamallur axolotlur, Dahl, Bókadeild Føroya Lærarafelags, 2022)
Rithøvundur og myndprýðari: Linda Bondestam (FI)
Förlaget, 2020

Tilnevnd Barna- og ungdómsvirðisløn Norðurlandaráðsins 2021.

Søgugongd: Ein lítil axolotlur trívist væl á havsins botni saman við vinum sínum, líka til lívsumhvørvið kollveltist, tá ein stór alda skolar alt burtur.

Evni: veðurlagsbroyting, einsemi, sjógvur




## Samtalur og virksemi:

### HYGG OG LES við teimum yngstu

**Hyggið at myndunum saman. Hvørjar forvitnisligar smálutir finna tit? Finna tit tann lítla axolotlin? Tit kunnu tekna tykkara egna axolotl og geva honum eitt navn.**

### TEY YNGRU

**1. Hyggið at kápumyndini. Hvat snýr bókin seg um?**

**2. Tá ið tikarasalamandrurnar hvørva, verður axolotlurin einsamallur eftir á havsins botni. Hann kennir seg einsamallari enn nakrantíð. Hvat heldur tú, hann hugsar um? Og hvat hevði tú gjørt, um tú vart ein einsamallur axolotl?**

**3.Finnið uppslagið, har axolotlurin droymir um eina eydnuríkari tíð. Tekna ein axolotl, lita og gev honum tínar yndislitir. Gev honum eitt navn. Tá ið øll eru liðug við tekningina, kunnu tit finna uppá, hvat ið tykkara axolotlar fara at gera, tá ið tær sleppa at vera saman. Lurtið eftir lagnum, sum axolotlurin spælir á telefonini, meðan tit arbeiða.**

### MIÐLINGAR

**1. Í heimasjónum hjá axolotlinum er burturkast og dálking, sum gevur útbrot, ið skriðar. Hvat slag av umhvørvi heldur tú, axolotlinum dámar allarbest? Teknið ella gerið eina mynd við kollasju.**

**2. Axolotlurin klárar seg til endans, og tað eydnast honum at fáa nýggjar ungar. Summi djórasløg fóta sær, og onnur doyggja út og hvørva fullkomiliga. Hvørjum kemst tað av, heldur tú?**

**3. Steðgið á og kjakist miðskeiðis í bókini: Hvat er tað ringasta, sum kann henda nú? Hvat er tað besta, tú vónar skal henda nú?**

**4. Finn upp á títt egna sjáldsama dýr. Dugir tað at flúgva, svimja, ganga, krúpa o.s.fr.? Hevur tað stert, kampar, armar, ryggfjaðrar, eygu ella kanska sevil? Hvønn lit hevur dýrið? Ger ein faktaglugga um djórið við:**

- **føði**
- **vekt, longd, umhørvi**
- **aldur/æviskeið**
- **vanar ella atburð.**

**Hvørjir eginleikar gera, at hetta dýrið fótar sær? Lurtið eftir tónleikinum, sum axolotlurin spælir á telefonini, meðan tit arbeiða.**

### TEY STØRRU BØRNINI

**1. Hvussu dámdi tær bókina? Hvat dámdi tær ikki? Kendist okkurt torført? Sært tú mynstur og annað, ið vísir til aðrar søgur?**

**2. Lívið hjá axolotlinum er hótt av mongum ymiskum vandum í umhvørvinum. Hvørjar aðrar vandar finna tit í bókini? Hvørjar umhvørvishóttanir hava tit varnast í tykkara egna umhvørvi, og hvørja støðu hava tit til tær?**

3. Drumbarnir blaka mangt og hvat á sjógv, sum verður til skattir ella bara órudd. Leitið eftir ymiskum, sum drumbar leggja eftir seg í tykkara umhvørvi. Gerið kollasju ella installatiónir av lutunum og óruddinum. Takið myndir av teimum og skrivið um tað, tit finna. Hugleiðið um, hvør ið hevur mist lutirnar, og um onkur kanska saknar teir.

4. Heimurin er myrkur, oyðin og rættiliga vandamikil hjá einum einsamøllum lítlum axolotli. Kannið myndirnar, har axolotlurin er púra einsamallur. Skiftið orð og hugleiðið um, hvat myndirnar siga, og hvørjum kenslum tær siga frá. Hvørjar møguleikar hava vit at fóta okkum í heiminum sum einsamallir skapningar?

Lurtið eftir tónleikinum, sum axolotlurin spælir á telefonini, meðan tit arbeiða.

5. Hugsa um orðaspælið við heitinum Mítt botnlív. Hvussu kunnu vit tulka heitið?

**LES EISINI:**

*Rosie springer* eftir Mariku Maijala
*Øll telja við* eftir Kristin Roskifte
*Koira nimeltään Kissa* eftir Tomi Kontio og Elina Warsta

## MÁLBITIN

# "Veðurlag"

| svenskt | danskt | norskt | íslendskt | føroyskt | grønlendskt | finskt | norðursamiskt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Klimat | Klima | Klima | Loftslag | Veðurlag | Silap pissusia | Ilmasto | Dálkkadat |



Frámerkið myndir av tykkara lesiupplivingum við **#nordiskabokslukaren**!